Hósdagur

# Dimmalætting

Nr. 198 • 119. árgangur • 28. november 1996 • Tlf. 11212 • Fax 10941 • e-mail: dimma@olivant.fo

— ÁLÍTANDI TÍÐINDI

7 kr.

»Okkara Gulu«

# Heilsufrøðiliga Starvsstovan vil banna aling á Vatnsnesi

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan mælir frá at geva umhvørvisgóðkenning til aling á Vatnsnesi í Hovi. Heri Hjelm, sum hevur søkt um umhvørvisgóðkenning, sigur, at millum 70 og 80 fólk missa arbeiðið, um Heilsufrøðiliga Starvsstovan fær sín vilja.**

GRÆKARIS DJURHUUS MAGNUSSEN

Í eini frágreiðing, sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur sent P/F Hovsá v/ Hera Hjelm verður gjørt greitt, at Starvsstovan mælir frá at geva umhvørvisgóðkenning til aling á Vatnsnesi. Verður niðurstøðan hjá Starvsstovuni endalig, so noyðist Heri Hjelm at steðga allari aling á Vatnsnesi í Hovi. Í løtuni ganga umleið 370.000 smolt í vatninum.

Heri Hjelm sigur við Dimmalætting, at avgerðin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kann koma at kosta honum alt virksemið.

– Verður alingin á Vatnsnesi í Hovi steðgað, so rapar alt korthusið. Alt virksemið hjá felagnum, bæði í Hovi og á Roykivirkinum í Porkeri steðgar upp. Og smoltstøðin í Víkarbyrgi fer sama veg, sigur Heri Hjelm.

Hann sigur, at hetta kann koma at kosta útvið 80 fólkum arbeiðið.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan sigur m.a., at tað hóskar ikki at hava smoltaling á vøtnunum, tá havt verður í huga náttúruna. Starvsstovan sigur eisini, at P/F Hovsá ikki hevur víst neyðugt umhvørvisligt fyrilit í alingini á Vatnsnesi.

Heri Hjelm sigur hinvegin, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan onga lívfrøðiliga grundgeving hevur fyri at banna aling á Vatnsnesi.

Lesið á síðu 3



Normaðurin Arild Saasen frá »Institutt for petroleumsteknologi« í Stavanger hevur nærum fingið eina samstarvsavtalu í lag við Náttúruvísindadeildini hjá Fróðskaparsetrinum. Á myndini síggjast frá vinstru: Magnus Danielsen, lærari á Náttúruvísindadeildini, Arild Saasen og Hans Pauli Joensen, leiðari á Náttúruvísindadeildini

Mynd: Álvur Haraldsen

# Oljuútbúgvingarsamstarv millum Noreg og Føroyar

**Varastjórin á »Instituttfor Petroleumsteknologi« í Stavanger, Arild Saasen, hevur verið í Føroyum og kannað møguleikarnar fyri, at føroyingar kunnu koma til Stavanger at útbúgva seg innan oljuvinnuna. Í gjár vitjaði hann Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum.**

DIA MIDJORD

Lærustovnurin fyri oljuteknologi í Stavanger kann eitt nú bjóða eina eitt ára eftirútbúgving innan oljuteknologi. Og tað er í hesum sambandi, at norðmaðurin Arild Saasen hevur vitjað Fróðskaparsetur Føroya. Hann hevur saman við leiðaranum fyri Náttúruvísindadeildina Hans Pauli Joensen roynt at fingið í lag eina samstarvsavtalu.

Avtalan ber í sær, at tey, ið hava tikið ella taka 2 ára støðisútbúgvingina á Náttúruvísindadeildini, fáa møguleikan at sleppa til Stavanger at lesa víðari, um tey ynskja at venda nøsini móti oljuvinnuni. Talan er fyrst og fremst um eitt ára eftirútbúgvingina innan oljuteknologi.

## Nærum í hús

Og uttan at taka munnin ov fullan, so tykist ein avtala vera í pottinum. Bæði Arild Saasen og Hans Pauli Joensen eru fegnir um úrslitið, sum fyribils er komið burturúr.

– Tá ein skal gera slíka samstarvsavtalu, so krevst fyrst og fremst góður vilji frá báðum pørtum. Og hesin vilji hevur so avgjørt verið til staðar, sigur Arild Saasen.

Kortini verður samstarvsavtalan ikki endaliga avgreidd á hesum sinni, tí Arild skal leggja kortini á borðið, tá hann kemur heimaftur. Ætlanin er so, at eitt uppskot til samstarvsavtalu verður sent til Náttúruvísindadeildini.

Í løtuni eru tveir føroyskir verkfrøðingar á Lærda Háskúlanum í Stavanger. Teir hava fingið stuðul frá Atlantic Margin Group til at taka útbúgvingina. Verkfrøðingarnir eru Jógvan Hugu Hansen og Johan Anthoniussen. Sambært Arild Saasen, ið fyri kortum hevur prátað við teir, so trívast teir sera væl.

# Frysti-goymsla bjargar Vestlax




**Tey umleið 20 tonsini av liðugtvørum, sum Vestlax dagliga framleiðir í Hirtshals til fyrst og fremst týska marknaðin, verða løgd á goymslu, meðan blokadan í Danmark steðgar øllum útflutningini.**

NICLAS JOHANNESEN

– Vit hava ongar trupulleikar við goymsluplássi, og sum er verður framleitt inn á lagur.

Hetta sigur Kim Durhuus, innkeypari hjá Vestlax í Hirtshals, í sambandi við, at danskir lastbilførarar blokera allir vegir út av landinum, tí teir vilja hava meira í løn.

Hetta rakar eisini føroysku fyritøkuna í Hirtshals. Men støðan kundi verið verri.

– Ja, okkara vørugoymsla er rættiliga stór, so tey umleið 20 tonsini, vit dagliga framleiða, verða løgd á lagur, sigur Kim Durhuus.

Hann sigur, at keyparar sjálvsagt seta seg í samband við Vestlax, tí teir ikki fáa vørur sum avtalað. Men hetta er galdandi fyri allar framleiðarar.

Ikki minst tí norskur rávørufiskur heldur ikki sleppur niður á Meginlandið.

Týskland er nógv tann størsti marknaðurin hjá Vestlax, og dagliga fer ein lastbilur til Týsklands við vørum hjá føroysku fyritøkuni.

## Í BLAÐNUM Í DAG



### Astrup finst at Dimmalætting

Í viðmerking í blaðnum í dag finst stjórin í Føroya Banka, Jørn Astrup Hansen, harðliga at grein í Dimmalætting í farnu viku um Føroya Banka. Orsøkin er eitt nú tann, at blaðið hevur siterað ónavngivnar keldur. Lesið eisini svarið, hann fær.

Síða 7

### Starvsstovan noktar Hovsá umhvørvisgóðkenning

Hóast endalig avgerð ikki enn er tikin í sambandi við, at P/f Hovsá vil hava Vatnsnes í Hovi umhvørvisgóðkent til aling, so er lítil ivi um, at Hovsá onga umhvørvisgóðkenning fær.

Síða 3

### Jákup Joensen harmast orðini hjá løgmanni

Tinglimurin Jákup Joensen heldur, at løgmaður »foregriber begivenhedernes gang«, tá løgmaður sigur, at um nevndin, ið skal fyrireika arbeiðssetningin hjá eini møguligari stjórnmálanevnd, kemur til eina niðurstøðu, ið leggur upp til broytingar í heimastýrislógini, so verður val.

Síða 3

### Ein løgin semja millum kommunu og landsstýrið

Tórshavnar Býráð metti inntøkurnar átta milliónir hægri fyri 1997, oyramerkti avlopið á níggju milliónir, hækkaði reguleringskontoina við einari millión og kontoina til útstykkingar við tveimum milliónum. Soleiðis kundu 20 milliónir sparast, so landsstýrið kundi góðtaka fíggjarætlanina fyri 1997.

Síða 4

### Vicenza fegnast um fyrsta plássið – so leingi tað varar

Vicenza-venjarin Francesco Guidolin roynir ikki at gera nógv burtur úr tí søguliga avrikinum hjá sínum liði, sum legði seg á odda í italsku Seriu A eftir at hava vunnið 2-0 á Reggiana sunnudagin.

Síða 6

✔ Bøkur
✔ Brævørk
✔ Brævbjálvar
✔ Fakturar
✔ Heftir
✔ Kontoavrit
✔ Visittkort
✔ o. m. a.

Verður skjótt og væl greitt úr hondum á

Dimmalætting

Tlf. 11212
Fax 17681

Eykaaðalfundur fyri ung sambandsfólk

Komandi leygardag kl. 13 skipar Ungmannafelagið Samband fyri eykaaðalfundi í hølum Sambandsfloksins í Tróndargøtu 16. Byrjað verður við ábiti. Møtið fjølment og gerið tykkara ávirkan galdandi.

Ungmannafelagið Samband

FLOGFERÐA SEÐLAR
Faroe Travel
Tlf. 12600

FLOG-FRAKT
Faroe Cargo
Tlf. 18787